## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 16 og 20 stig, men har mjørki legst – um 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Fleyr til gul av eystri og landnyrðingi og fyrrapartin yvirhøvur turt og sólglottar, men seinnapartin ælingur. Hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 17 stig.

# Undankappingarnar í Nósabarnaprix lidnar

**Nú er bert finalan í Nósabarnaprix eftir, sum verður í Badmintonhøllini á ólavsøku. Tað varð Konni Kass Jacobsen, ið vann seinastu undankappingina í bygdahúsinum í Miðvági leygarkvøldið**

NÓSABARNAPRIX
*Rúna Sivertsen*



*Tað varð 12 ára gamla Konni Kass Jacobsen úr Hoyvík, sum streyk avstað við sigrinum í seinastu undakappingini í Nósabarnaprix, sum var í bygdahúsinum í Miðvági leygarkvøldið*

Seinasta innleiðandi kappingingin í Nósabarnaprix 2003 var í bygdarhúsinum í Miðvági leygarkvøldið. Vinnarin bleiv Konni Kass Jacobsen. Nummar 2 gjørdist Kamilla Ravnsfjall.

Konni og Kamilla vóru eisini báðar tvær við í Nósabarnaprix-sangkappingini í fjørð, og í ár megnaði onnur teirra at syngja seg til eitt finalupláss.

Tey, sum verða við í finaluni í Badmintonhøllini í Havn á ólavsøku eru hesi:

Soffía Lind Rasmussen, 10 ár Klaksvík, við sanginum, "Minnist tú hitt summarið".

Rebekka Rafael Petersen, 13 ár úr Kollafirði, fer at syngja "Tína dýrd tú offraði".

Manja Johansen, 12 ár á Tvøroyri, luttekur við sanginum "Ommu míni hjá" og Súsanna Samró, 9 ár úr Hoyvík, syngur "Puff mín loynidreki"

Terji Højgaard, 11 ár úr Kaldbak, er einasti drongur, sum eydnaðist at koma við í finaluna. Hann fer at syngja, "Stjørnurnar blinka"

Durita Mohr Jacobsen, 12 ár Fuglafjørður, sum vann á Kambsdali, har hon eisini býr, fer at syngja, "Vit eru glað"

Og seinasti vinnarin í undankappingin varð Konni Kass Jacobsen, 12 ár úr Hoyvík, við sanginum, "Syngja sama lag".

### Spennandi finala

Millum teirra, sum gjørdust nummar 2, var lutakast um trý, sum eisini sleppa við á Nósabarnaprix-fløguna 2003. Tað vórðu tær tríggjar, Ansa Højgaard Søldafjørður, Jóna Poulsen, Sumba og Durita Djurhuus, Kollafjørður, sum gjørdust hepnu vinnararnir av lutakastinum.

Tær tríggjar, Ansa, Jóna og Durita fáa høvi at syngja fløgusangin á finaluni , men luttaka ikki í kappingini um heiti, "Vinnari av Nósabarnaprix 2003" og tær 10.000 krónurnar, sum vinnarin fær.

Vinnarin fær eisini eitt stórt steyp til ognar. Nummar 2 og 3 fáa eina peningagávu, og eisini verða gávulutir til allar finalistar og gestasangarar.

Finalan í Nósabarnaprix 2003 verður í Badmintonhøllini í Havn mánakvøldið tann 28. juli klokkan 19.

Í steðginum, meðan dómararnir fara undir at truplu uppgávuna, tað oftast er at velja vinnaran, koma klovnurin Hannibal og Angela á pallin at undirhalda. Tey hava nógv nýtt og spennandi á skránni.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | 21 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 13 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 30 |
| Tromsø | 22 |
| Bergen | 23 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 29 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 27 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 22 |
| Kiev | 21 |
| Bukarest | 25 |
| Paris | 33 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 39 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 20 |
| New York | 27 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | -- |
| La Paz | -- |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 14 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1003 hPa. yvir Ermasundi fer spakuliga norðureftir. Eitt hátrýst, 1030 hPa yvir Finlandi breiðir seg vestureftir.




**Í dag:**
Millum hátrýstið yvir Norska Havinum og lágtrýstið yvir Onglandi rekur lýggj luft framvegis móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/07 kl. 06[00]–16/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm –mált frá 15/07 kl. 06[00]–16/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 48,0 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 10.30 | 22.52 | 09.30 | 21.52 | 09.45 | 22.07 | 00.06 | 12.30 | 01.06 | 13.30 | 08.45 | 21.07 |
| 18. juli | 11.14 | 23.34 | 10.14 | 22.34 | 10.29 | 22.49 | 00.52 | 13.14 | 01.52 | 14.14 | 09.29 | 21.49 |
| 19. juli | 11.54 | — | 10.54 | 23.15 | 11.09 | 23.30 | 01.34 | 13.54 | 02.34 | 14.54 | 10.09 | 22.30 |
| 20. juli | 00.15 | 12.37 | 11.37 | — | 11.52 | — | 02.15 | 14.37 | 03.15 | 15.37 | 10.52 | 23.23 |
| 21. juli | 01.08 | 13.40 | 00.08 | 12.40 | 00.23 | 12.55 | 03.08 | 15.40 | 04.08 | 16.40 | 11.55 | — |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 07.45 | 20.07 | 10.45 | 23.07 | 11.45 | — | 10.15 | 22.37 | 11.30 | 23.52 |
| 18. juli | 08.29 | 20.49 | 11.29 | 23.49 | 00.07 | 12.29 | 10.59 | 23.19 | — | 12.14 |
| 19. juli | 09.09 | 21.30 | — | 12.09 | 00.49 | 13.09 | 11.39 | — | 00.34 | 12.54 |
| 20. juli | 09.52 | 22.23 | 00.30 | 12.52 | 01.30 | 13.52 | 00.00 | 12.22 | 01.15 | 13.37 |
| 21. juli | 10.55 | 23.29 | 01.23 | 13.55 | 02.23 | 14.55 | 00.53 | 13.25 | 02.08 | 14.40 |